

**VÆL SLOPPIÐ**

*Um góð trý ár sleppur ein ungur maður a taka koyrikortið aftur og tað er væl sloppið, eftir at hann fleiri ferðir er tikin fyri at koyra óforsvarliga og ávirkaður av bæði rúsdrekka og rúsevnum*

# Misti koyrikortið í fimm ár

Áki Bertholdsen

Ein ungur maður sleppur ikki at taka koyrikortið aftur fyrrenn á hásumri í 2014.

Tað hevur Føroya Rættur avgjørt.

Harafturat skal hann rinda 8.000 krónur í bót, umframt at hann skal arbeiða fyri onki í eina viku.

Tað er hetta, tey kalla samfelagstænastu og tað merkir, at hann skal gera okkurt samfelagsgagnligt arbeiði í 40 tímar, ólønt.

Men ger hann nakað revsivert hesi bæði næstu árini, skal hann eisini í fongsul í 40 dagar fyri tað, hann longu hevur gjørt, umframt revsingina fyri tað nýggja lógarbrotið.

Tilsamans misti hann koyrikortið í fimm ár, men tað er galdandi frá 8. august í 2009, tá ið hann misti tað fyrstu ferð.

## Slapp væl

Hóast hetta er ein rættiliga umfatandi revsing, heldur maðurin ivaleyst, at hann er væl sloppin, tí stóð tað til ákærvuvaldið, hevði hann ikki fingið koyrikortið aftur fyrrenn um eini seks ár.

Ákærin helt, at dómurin skuldi vera so strangur, tí tað var ikki smávegis lógarbrot, maðurin hevði gjørt

Hóast hann ikki hevur havt koyrikort í meiri enn gott og væl tvey ár, er hann longu tikin fleiri ferðir fyri óforsvarliga koyring og fyri at koyra ávirkaður av bæði rúsdrekka og rúsevnum.

Fyrst fekk hann koyriforboð fyri at hava koyrt ov skjótt og fyri at hava yvirhálað ein bil høgrumegin.

Tíverri fyri hann, var talan um ein politist, sum var á veg heim av vakt, men tann vaktin varð brotin og maðurin tikin og skuldsettur.

Síðani varð hann tríggjar ferðir upp í slag tikin fyri at koyra við góðari kenning. Ta einu ferðina var hann enntá ávirkaður av bæði rúsdrekka, hassji og amfetemini.

Tá endaði tað eisini galið, tí hann rendi á ein garð, men varð tikin.

Tá ið løgreglan kom á staðið, royndi hann at billa teimum inn, at bilføffarin var rýmdur av staðnum.

Men eitt vitni hevði sæð hann koma bóltandi út ígjøgnum vinstru framhurð á bilinum, so tað fekk hann heldur ikki smoygt sær undan.

Umframt alt hetta, hevur løgreglan nakrar ferðir funnið smáar nøgdir av rúsevnum uppi á honum.

Verjin hjá manninum heitti á rættin um at vera lagaligan, tí maðurin hevði tikið betri partar fyri seg. Hann hevði tikið eina útbúging og var nú í ferð við at byggja oman á hana.

Sjálvur stúrdi maðurin mest fyri at, at hann bleiv noyddur klára seg við ongum koyrikorti so leingi í eini seks ár afturat, men nú kann hann so seta kross í 8. august í 2014, tí tað kann aftur seta seg aftanfyri rattið.

*aki@sosialurin.fo*

# Stungin í búkin við longum knívi

Áki Bertholdsen

Ein bardagi í Klaksvík í sunnunáttina fekk ein álvarsligan enda, tá ið ein maður varð stungin í búkin við knívi.

Tveir mans í tjúgunum komu til ilnar í einum húsum og tað endaði við, at teir fóru útum.

Tað, løgreglan veit, er, at uttanfyri fara menninir umkoll og at annar fær ein knív í búkin.

Løgreglan sigur, at sárið var djúpt og at maðurin varð fluttur á Klaksvíkar Sjúkrahús, har hann framvegis liggur.

Hin maðurin varð handtikin og varð til avhoyringar at allan fyrrapartin sunnudagin

Tað, løgreglan royndi at fáa greiði á, var, hvussu tilætlað tað var, at maðurin varð stungin áðrenn støða varð tikin til, um maðurin skuldi í rættin ella ikki.

Men á miðdegi í gjár varð avgerð um, at hann skuldi fyri ein dómara og har varð hann skuldsettur fyri fyrst at hava hótt hin mannin og síðani fyri at hava stungið hann, so at lívið varð sett í vanda.

Maðurin varð stungin við einum 30 sentimetra longum knívi og sárið var rættiliga djúpt.

Av tí, at vitni skuldu avhoyrast, var rættarfundurin fyri afturlætnum hurðum fyri ikki at órógva kanningararbeiðið.

Ákærin kravdi, at maðurin varð varðhaldsfongslaður í tríggjar ferðir 24 tímar íméðan málið varð kannað og tað eftirlíkaði dómarin.

*aki@sosialurin.fo*